# ítróttur

Nr. 19 • fríggjadagur • 28. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Tríggir mans afturat í landsliðshópin

Um vikuskiftið savnast føroyski a-landsliðshópurin í fótbólti til venjingar í Havn. Tað er nú nakað síðani, at landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, tók út hópin til venjingarnar, men nú hava so tríggir mans afturat fingið boð um at møta til venjing. Teir eru Ovi Nysted úr KÍ og teir báðir, Óli Hansen og Christian Høgni Jacobsen úr NSÍ.

**tn**

StÍF-H71 22-22(8-10) samanlagt 48-47

# Hoyvíkingar kæra dystin

**Leingi sá út til, at H71 fór at vinna sær pláss í steypafinaluni, men seinastu tíggju minuttirnar vendi dysturin til fyrimuns fyri strandingar. Seinasta orðið um dystin er tó neyvan sagt enn, tí væntandi fara hoyvíkingar at kæra**



*Mikukvøldið tryggjaði StÍF sær enn einaferð sess í steypafinaluni hjá monnum, men seinasta orðið er neyvan sagt um dystin móti hoyvíkingum enn. H71 hevur nevnliga kært eina dómaraavgerð í sambandi við eitt time-out til HSF.*

*savnsmynd*

COCA-COLA KAPPINGIN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hoyvíkingar kunnu takka sær sjálvum fyri, at teir ikki annað árið á rað eru við í steypafinaluni hjá monnum í hondbólti. Mikukvøldið vóru teir inni á Skála og spældu seinnu hálvfinaluna móti StÍF, sum undan dystinum hevði ein lítlan fyrimun, tí at teir høvdu vunnið fyrra dystin við einum máli í Hoyvík tvær vikur frammanundan.

### Hoyvíkingar omaná

Tað var eitt sera uppsett H71-lið, sum fór á vøllin inni á Skála, og tað tóktist sum um, at teir høvdu gjørt sær greitt, at skuldu teir vinna felagnum nakran heiður í hesum kappingarárinum, so var neyðugt at taka sær um reiggj og stríðast fyri hvørjum bólti.

Hoyvíkingar hava higartil í ár havt stórar trupulleikar av verjuni hjá sær, sum teir hava havt ilt við at fingi skil á. Mikukvøldið var verjan tó sera stinn, og tá ið so Levi Nybo í málinum, samstundis hevði ein heilt góðan dag, sá tað bara heilt gott út hjá gestunum.

Tað var eisini H71, sum fekk bestu byrjanina upp á dystin. Eftir at liðini høvdu fylgst fyrsta korterið, fóru hoyvíkingar eitt sindur fyri StÍF seinsta korterið av fyrra hálvleiki, og tað sá út til, at teir kundu lagt seg avgerandi á odda.

### Mistu høvdið

StÍF hevði valt at verja við síni vanligu offensivu verju, og serliga var tað á miðjuni, at teir lógu frammalaga á Halgir. Hetta gav tó pláss til stóra Piti Negru, sum var besti maður hjá hoyvíkingum við níggju málum mikukvøldið.

Hinvegin merkti offensiva verjan hjá strandingum eisini, at tað gekk ógvuliga striltið hjá H71 at fáa veruligt glið á álopsspælið hjá sær. Av tí sama gjørdist tað ofta talan um heldur hasaraderaðar málroyndir frá H71, og tað var lætt hjá einum annars vælleikandi Marian í málinum hjá StÍF at taka sær av.

Í hinum endanum vardu hoyvíkingarnir rættuliga flatt, og tað hóskar seg eisini væl, tá ið havt verður í huga, hvussu stórar menn H71 hevur á liðnum. Við monnum sum Piti Negru, Halgir Dahl Olesen, Olaf Vesturgarð og Henrik Gerster í miðverjuni, hevur tú sum álopsspælari ein sannan múr framman fyri tær, um verjan hevur ein góðan dag.

At H71-verjan hevði ein góðan dag, noyddist eitt nú Leivur Justinussen, ið vanliga er ein tann frægasti málskjúttin hjá strandingum. Leivur fekk mikukvøldið bert tað eina málið, og tað var fyrst og fremst H71-verjuni og Levi Nybo í málinum fyri at takka.

### Artur vendi dystinum

Hoyvíkingar høvdu munin størsta partin av dystinum, men móti dystarenda komu standingar aftur í aftur. Veteranurin Artur Johansen bleiv sendur á vøllin, og tað vísti seg at verða ein skilagóð avgerð.

Eftir at H71 10 minuttir fyri tíð var á odda við trimum málum, megnaðu strandingar at berja seg upp á javnleik seinastu løtuna og harvið tryggja sær finaluplássið. Artur, sum annars hevði sitið á beinkinum mesta partin av dystinum, var sera avgerandi hesa løtuna. Umframt at hann skoraði tvey av málunum hjá StÍF seinastu tíggju minuttirnar, hevði hann eisini onkra fríspæling til viðleikarar, sum síðani skoraðu og harvið fingu heimaliðið upp á javnt.

At H71 tíðliga miðskeiðis í seinna hálvleiki misti leikandi venjaran, Henrik Gerster, bøtti heldur ikki um støðuna hjá hoyvíkingum. Teir megnaðu snøgt sagt ikki at halda høvdið kalt, tá ið mest stóð á, og tað kostaði teimum sigurin og finaluplássið.

### Umstrídd avgerð

Sum áðurnevnt er seinasta orðið um henda dyst neyvan sagt enn, tí H71 hevur kært dystin. Kæran hjá H71 snýr seg um eitt time-out, sum StÍF hevði einar sjey minuttir fyri leiklok.

Bonkurin hjá strandingum gevur dómaraborðinum Time-out kortið, og dómaraborðið roynir við lúðuri at gera dómarunum vart við hetta, men av tí at sera nógvur gangur er í høllini, hoyra teir ikki veika lúðurin. StÍF spælir tí eitt langt álop liðugt, sum endar við, at Levi í H71-málinum bjargar. H71 fer í álop, men nú gerast dómararnir varugir við time-out kravið frá StÍF. Teir tosa við dómaraborðið, sum eisini trýsti á lúðurin, eftir at H71 hevði vunnið bóltin, og avgjørt verður, at strandingar fáa bóltin aftur og nýtt álop. Hetta vóru hoyvíkingar ikki fegnir um, tí teir mettu ikki, at StÍF soleiðis kann fáa eitt nýtt álop ókeypis. Hetta hava teir so kært til kappingarnevndina hjá HSF, og málið verður óivað viðgjørt í næstum.

Hondbóltslógirnar siga: "Floytuljóðið frá tíðtakara/-skrivara stegar í prinsippinum dystinum og alt tað, sum hendir eftir hetta verður ógildað, tó undantikið persónligar revsingar. Tað vil siga, at gul kort, útvísingar v.m., sum verða givin í tíðarbilinum millum floytuljóðið og tekini frá dómarunum um at steðga dystinum, verður galdandi"

Spurningurin er so, um dómaraborðið hevur gjørt vart við seg á tann hátt, sum lógirnar hjá HSF krevja, og eisini er spurningurin um tíðina. Tá ið valt verður at bakka dystin aftur til har, sum dómaraborðið markeraði fyri time-out, skal tíðin so eisini bakkast ella hvussu. Undir øllum umstøðum verður málið gjølla viðgjørt av HSF, og so mugu vit bara bíða í spenningi eftir avgerðini hjá kappingarnevndini.

**StÍF-H71 22-22(8-10)**

**StÍF:** Sveinur Justinussen 8(2), Artur Johansen 4, Pauli Hansen 3, Alexandur Johansen 2(2), Bent Djurhuus 2, Leivur Justinussen 1, Borgar Danielsen 1, Bárður Danielsen 1

**H71:** Piti Negru 9, Christian Eli Zachariassen 4(3), Halgir Dahl Olesen 4, Henrik Gerster 2, Høgni Joensen 1, Olaf Vesturgarð 1, Heini Bentsen 1

**Brotskøst:** StÍF 5(4), H71 6(3)

**Útvísingar:** StÍF 2, H71 7

**Dómarar:** Hannis og Uni Wardum

# FM-rógving

**Leygardagin verður innandurakapping í rógving. Her koma rógvarar úr øllum landinum at rógva ímóti hvørjum øðrum. Kappingin byrjar leygarmorgunin klokkan 8.00 í fimleikahallunum í Tórshavnar kommunuskúla**

TÍÐINDASKRIV

Vit hava gjørt tað soleiðis, at allir rógvararnir verða vigaðir um morgunin. Vektina teir fáa tá, er galdandi fyri alla kappingina. Rógvararnir 20 ár og yngri, 16 ár og yngri, og lættvektararnir hava fyrsta rætt at viga seg, tí teir koma at rógva fyrst.

Tíðaráætlanin fyri rógvukappingina leygardagin er henda:

**08:00** Byrja at viga rógvarar.
**09:00** Allir rógvarar skulu verða møttir. Greitt verður frá, hvussu kappingin kemur fer fram.
**10:00** Øll skula hava vigað seg.
**10:30** 16 ár og yngri rógva 1000m (dreingir og gentur rógva samstundis)
**10:45** 20 ár og yngri rógva 1000 (dreingir og gentur rógva samstundis)
**11:00** Lættvekt og tungvekt kvinnur 2000m (Allar rógva samstundis)
**11:15** Lættvekt menn 2000m (fyrsti bólkur)
**11:30** Lættvekt menn 2000m (næsti bólkur)
**11:45** Tungvekt menn 2000m (fyrsti bólkur)
**12:00** Tungvekt menn 2000m (næsti bólkur)
**12:15** 35 ár og yvir 1000m
**12:30** Steðgur
**13:30** Blandaður bólkur 500 m
**14:30** Stafett, har hvør rógvari rør 500m
**15:30** Heiðursmerki verða handað

Vit heita á allar rógvarar at verða klárir minst 15 min, áðrenn teir skulu rógva. Tað verður ikki bíðað eftir nøkrum, so tað ræður um at vera til reiðar. Fyrivarni skal takast fyri ásettu tíðirnar.

Vinnarin av hvørjum bólki fær handað steyp og gull heiðursmerki. Nr tvey og trý í hvørjum bólki fáa ávikavist silvur og bronsu heiðursmerki.

Fyri at gera tað enn meira áhugavert, hevur Modest-Sport í Danmark givið eitt sera gott pulsur til øll tey, sum eru við í 500 m blandaða bólkinum. Her verður lutakast í millum øll, sum eru við í hesum bólki, so øll hava møguleika at vinna pulsurið. Urið er eitt tað nýggjasta hjá Polar og eitur Polar s625x. Tað hevur eitt virði uppá umleið 3.000,- krónur.

Formaðurin í róðrarsambandinum Hannis Jonsen kemur at handa heiðursmerkini. Tey verða handað umleið klokkan 15:30.